# Ársfrágreiðing fyri Vísindasiðsemisnevndina 2016

Vísindasiðsemisnevndin er sett við heimild í "Lov om et videnskabsetisk komitésystem og behandling af biomedicinske forskningsprojekter", sum varð sett í gildi við kongligari fyriskipan nr. 961 15. juli 2013.

Nevndin hevur sjey limir, fýra leikfólk og trý fakfólk við granskingarroyndum innan heilsuvísund.

Limirnir í 2016:

- Jens Andreassen, formaður, lækni og granskari
- Gunnhild Helmsdal, lækni og granskari
- Ann E. Østerø, leiðari á Diagnostiska Deplinum, LS
- Oluf Færø, næstformaður, cand. scient
- Halgir Winter Poulsen, cand. jur. fv. advokatur
- Gunnvør á Norði, lívfrøðingur, granskari
- Armgarð Arge, cand. theol. og tíðindakvinna

Skrivari: Anna Maria Ellingsgaard, cand. soc í HRM (1. ársfjórðing 2016), síðan Ann E. Østerø.

Avgerðir hjá føroysku vísindasiðsemisnevndini kunnu kærast til DNVK (Den Nationale Videnskabsetiske Komité) í Danmark, sum síðan 1. januar 2017 hevur skift navn til NVK (National Videnskabsetisk Komité). Sami kærimøguleiki er fyri avgerðir tiknar av staðbundnu vísindasiðsemisnevndunum í Danmark.

Endamálið hjá Vísindasiðsemisnevndini er at tryggja, at heilsuvísindaligar granskingarverkætlanir eru skipaðar á vísindasiðsemiligum tryggum grundarlagi. Sum grundregla skulu rættindi og tryggleiki hjá royndarpersóninum takast framum vísindalig og samfelagslig áhugamál í heilsugransking.

Umframt lóggávuna fyriheldur nevndin seg til almennu meginreglurnar hjá National Videnskabsetisk Komité (NVK), soleiðis sum tær eru tøkar á heimasíðuni www.nvk.dk.

## Fundir og umsóknir

Nevndin hevði 10 fundir í 2016 og viðgjørdi 17 umsóknir. Harav vórðu 9 umsóknir góðkendar og við 8 umsóknum varð staðfest, at tær kravdu ikki viðgerð í nevndini. Í hvørjum einstøkum føri kom nevndin til eina felags niðurstøðu. Ongin niðurstøða kravdi atkvøðugreiðslu í nevndini.

Flest allar umsóknir vórðu svaraðar innan freistina á 60 dagar.

## Góðkendar verkætlanir í 2016:

1. ”Essentiellur Tremor í Føroyum”
2. “Parkinson”
3. “Characterizing PDE8A as a mediator of inflammation”
4. “Familiestudie af psoriasis hudsygdom på Færøerne – Familjukanning av psoriasis”
5. ”Barnakohortu 5, nú við 8-9 ára aldur” (Ískoytisverkætlan)
6. ”FarGen II: Genome Faroe Island” (Ískoytisverkætlan)
7. ”Effekt på fysisk formåen og sundhedsviden af 11 ugers fodboldtræning i skoleregi koblet til 11 sundhedsbudskaber - FIFA 11 for Health”
8. “Defining the genetic etiology of dementia Alzheimer's disease in the Faroe Islands” (Ískoytisverkætlan)
9. “Identifying susceptibility genes associated with hereditary breast and ovarian cancer (HBOC) syndrome in The Faroese population”.

## Virksemi og “netverkan”

Tað er umráðandi og gevandi fyri Vísindasiðsemisnevndina at luttaka í tiltøkum, sum hava til endamáls at lýsa vísindasiðsemisligar avbjóðingar, eins og tað er neyðugt at fylgja við, hvat rørir seg í granskingarhøpi í londum uttanum okkum. Orsakað stóru framstigini, sum granskingartøknin hevur verið fyri seinastu árini, kennist tað alt meiri avbjóðandi at taka atlit til rættindi og tryggleika hjá royndarpersóninum framum vísindalig og samfelagslig áhugamál í heilsugransking, hóast hetta sambært lógini eigur at verða tikið framum alla heilsugransking.

Fleiri umboð fyri nevndina luttóku á ókeypis ráðstevnu á Østrøm 20. september, sum Ílegusavnið var karmur um. Evnið á skránni var *“Kunning og kjak um álitið um útgreinan av lóggávuni á humangenomøkinum í Føroyum”.*

Formaðurin hevur luttikið á hesum ráðstevnum o.ø. fundum uttanlands:

*Genomics of the Future The 360° Perspective (Conference í CPH 18. Mars 2016)*
*Nordic Secretariats of Bio- and Research Etics Committees Annual Meeting 2016 í Reykjavík (29.09.16)*
*De Videnskabsetiske Kommiteers Årsmøde í CPH 2016 (06.10.16)*
*Observatør á fundi hjá DNVK 15. Apríl og 11. November 2016*

Vísindasiðsemisnevndin hevur í einum máli viðgjørt umbøn um innlit.

Harafturat vóru tvey hoyringsskriv viðgjørd í nevndini, og hesi vóru “Lov om forsikringslov” og “Etiskt Ráð”.